*Stríðið um Falklandsoyggjarnar*

Uttaneftir

# Møguleiki fyri semju?


Hoast skotbardagar um vikuskifti og hóast vandi er fyri at bretar eru við at fyrireika innrás á Falklandsoyggjunum, er vón um eina friðarliga loysn av kreppuni nú við ST-aladskrivaranum sum semingsmanni.

ST-aðalskrivarin Perez de Cuellar hevur ikki lagt nakra fullfiggjaða ætlan um framtíðarviðurskiftini hjá Falklandsoyggjunum fyri striðandi partarnar, men hevur hann gjørt nøkur uppskot, sum samráðst kunnu um.

Bæði Bretland og Argentina hava sagt seg vera sinnað at tingast við ST-aðalskrivaranum sum semingsmanni, de Cuellar hevur skotið upp vápnahvild og harnæst, at Argentina tekur herfólkið av aftur oyggjunum, og at Bretland tekur sini skip av leiðunum um oyggjarnar.

Hereftir skal ST tryggja, at vápnahvildin verður hildin og at bert ST-merki kemur at veitra á oyggjunum, meðan Bretland og Argentina tingast um eina varandi avtalu um oyggjarnar.

Tingingar eru í løtuni millum partarnar og sagt verður, at framstig eru gjørd. Greiða er fingin á fleiri málum men enn væntar nógv í. Frá ST verður sagt, at tað, at tingingarnar halda fram, meta teir sum eitt gott tekin.




Bingo liðugt:

*Sendið okkum plátur og tøl*





Í dag prenta vit seinastu fýra tølini í bingospælinum í Sosialinum. Bingospælið er sostatt liðugt fyri hesaferð.


**Øll tey, sum hava fingið øll 15 tølini, sum eru á plátuni, hava vunnið, og skulu tey senda plátuna saman við øllum 15 tølunum til okkara í innskrivaðum brævbjálva. Tey fáa síðani sendandi 1 kg. av ALI-kaffi og eina eskju av konfekt.**

**Øll tey, sum hava í minsta lagi 10 tøl rætt, skulu senda okkum plátuna saman við tølunum. Saman við bingovinnarunum vera hesi við í lutakasti um høvuðsvinningin, sum er ein 14 daga ferð til Benidorm. Hetta er ein av teimum ferðum, sum Trygvi F. Askham skipar fyri í summar. Tá vit hava funnið fram til hepna vinnaran av uttanlandaferðini, sleppur hann at velja, nær í ferðin skal vera.**


**Seinasta freist at senda okkum plátur og tøl, annaðhvørt talan er um BINGO — 15 rætt — ella í minsta lagi 10 rætt, er friggjadagin 21. mai—82.**

**Vit takka fyri áhugan fyri bingospælinum, og halda okkum longu kunna siga, at hetta neyvan verður seinasta bingospælið, sum Sosialurin skipar fyri.**






# Pólska kirkjan verður ávarað



*Tillkar mótmælisgongur eru vanligar í Warszava og øðrum pólskum býum*

Pólsku myndugleikarnir hava fritikið pólsku kirkjuna fyri at hava verið við til at byrta upp undir ófrið móti undantaksstøðuni í Póllandi. Men samstundis ávaraðu teir kirkjuna móti at lata seg bruka av mótstøðufólkunum hjá hernaðarstýrinum.

Hetta hendi eftir ein fund, har kirkjuleiðarar, saman við stjórnarumboðum, høvdu tingast um ófriðin og samanbrestirnar í Warszawa og øðrum pólskum býum.

Nógvir fakfelagsleiðarar, politifólk og onnur vóru løstað í ófriðinum, sum byrjaði uttanfyri fleiri kirkjur. Czeslaw Kiszczak, innanrikisráðharri upplýsti, at myndugleikarnir ikki hildu, at kirkjan stuðlaði mótmælisgongunum, men hann legði dent á, at tílíkar mótmælisgongur skjótt kundu gerast ein stor høttan.

— Gøtuófriður hjálpir ikki kirkjuni at fremja síni áhugamál segði ráðharrin.

Men kommunistiska floksblaðið Trybuna Ludu ivast ikki. Blaðið skrivaði, at religiøsu hátiðirnar í ávisum førum førdu til stórar almennar fundir, sum ofta endaðu við miklum ófriði.

Ein lýsing sæst best í sosialinum

tíðindablaðið sosialurin